Jákup og teir skulu hava kreppufund

Sigurin hjá FCK var kærkomin, tí flestu av liðunum í botninum hava síðstu vikurnar havt viðrák

Fyrstu ferð í langa tíð var Todi Jónsson at síggja í FCK-álopinum, eftir at hann fleiri dystir hevur leikt á miðjuni. Á myndini sæst álopsfelagið hansara, Zuma

Mynd: Álvur Haraldsen

Herfølge varð hølvað av, tá teir seinnapartin sunnudagin í tí, sum í Føroyum hevði verið mett at vera heilt gott summarveður, taptu 5–0 í Brøndby. „Legestue“, róptu væl hýrdu og nógvu Brøndby áskoðararnir fram móti dystarenda.

Sjálvsagt var hetta eyðmýkjandi fyri Jákup Mikkelsen at fáa oman yvir seg. Men føroyska málverjin, sum leygardagin stóð royndina, tá teir kekkaðu skaðan í ælboganum, nýttist ikki sjálvur at taka ábyrgdina fyri tapið á seg.

Sambært viðmerkjaranum í TV3, Svend Gehrs, sum man vera royndasti fótbóltstíðindamaðurin í Danmark, so var Jákup Mikkelsen besta maður á liðnum hjá Herfølge.

Sjálvsagt er tað hugaligt at hoyra hjá Jákupi Mikkelsen, men tað nyttar ikki nógv, tá tað alíkavæl fara fimm mál ígjøgnum. Øll vórðu tey skotin úr stuttari fjarstøðu, eftir at teir væl uppløgdu gulu og bláu – Herfølge var hesa ferð í hvítum og svørtum – høvdu spælt seg framvið allari verjuni.

Fund í vikuni

Herfølge hevur sammett við Brøndby mist átta stig í teimum tíggju umførunum, sum eru spæld, síðani teir á grækarismessu fóru undir aftur kappingina, og í løtuni er tað einki, sum bendir á, at Herfølge skal vinna meistaraskapin:

– Í vikuni fara vit at hava fund um støðuna. Munurin millum í heyst og nú í vár hevur verið, at í heyst skorað vit upp á teir flestu av møguleikunum, sum vit høvdu. Í vár hava vit bara skorað í trimum av tíggju dystum, og tað er sjálvsagt ikki nóg gott. John Faxe Jensen gav okkum ein orduligan uppsang í hálvleiksstaðinum, men tá vit mistu ein mann var einki at gera, og teir skoraðu trý mál í 2. hálvleiki, sigur Jákup Mikkelsen.

Herfølge er purrað út og noyðist at fara úr baróna-seingini, har teir hava verið í eitt hálvt ár, er tað, sum donsku fjølmiðlarnir siga. Teir rokna ikki við, at Herfølge verður meistari. Heldur rokna teir við, at størsta avbjóðingin til Brøndby fer at koma frá AaB. Meistararnir frá í fjør hava havt gott tak á tí síðstu vikurnar. Í gjárkvøldið spældu teir móti Silkeborg, og um teir vunnu tann dystin, so vóru teir javnir við Herfølge í stigum og tvey stig aftanfyri oddaliðið.

– Vit vónaðu at enda í millum fýra tey fremstu liðini. Hesum arbeiða vit framvegis fyri, og eydnast tað, so sleppa vit at spæla í Europa komandi kappingarár. Men tað verður strevið, sigur Jákup Mikkelsen.

Todi aftur í álopinum

FCK var og vitjaði grannarnar á Gladsaxe stadion. 8.683 áskoðarar nýttu góða veðrið, tá tey sóu Toda Jónsson og liðfelagarnir vinna 2–0.

Í vikuni uppundir dystin fekk Ole Mørch, fyrrverandi venjarin hjá Herfølge, sekkin í AB, tí teir vóru ikki nøgdir við úrslitini. Ole Mørch kom til AB, tá Christian Andersen fór úr AB og til FCK. Tað er meiri enn eitt ár síðani Christian Andersen fekk sekkin í FCK, so tað gongur lívliga fyri seg.

Kim Brink hevði hesa ferð sett Toda Jónsson í fremsta álopsplássið. Tað er merkisvert, tí frammanundan skaðnum, sum hevði við sær, at Todi fyrr í ár ikki fekk vant, varð hann mettur sum ein hin besti miðvallarin í vinstru síðu í superliguni.

Todi, sum spældi 70 minuttir og varð tikin út stutt eftir at FCK hevði skorað til 2–0, skoraði ikki, men hann hevði fleiri góðar frístpælingar av liðfeløgunum. Tíðliga sneiddi hann framvið tveimum, áðrenn hann gleið framvið málverjanum og eitt sindur út í vinstru. Hann kundi havt roynt við høgra beini móti málinum. Todi valdi heldur at spæla út frá til ein meiri leysan liðfelaga, men tá kom ein móstøðumaður ímillum.

David Nielsen hevur inntil í vár verið fremsti maður hjá FCK. At hann nú hevur mist plássið hevur havt við sær, at álopsmaðurin, sum Kim Brink í síni tíð í OB uppdagaði í Norðurjyllandi, nú vil sleppa burtur úr felagnum.

Botnurin lyftir seg

FCK droymir framvegis um europeiskan fótbólt eftir summarsteðgin, og tað eru framvegis møguleikar fyri tí. Men í fyrstu atløgu hugsa teir um at sleppa undan hóttanini av niðurflyting.

Esbjerg, sum tapti undirhaldandi og málríkan dyst í Árhus, tykist vera fokið, meðan stríðið um hitt niðurflytingarplássið framvegis er stórt. Tað eru seks umfør eftir at spæla, og FCK er á áttanda plássinum níggju stig frammanfyri Vejle, sum er næstniðast, men sum sunnudagin styrkti sína støðu við at smyrja Lyngby av.

Hjá FCK eru tað fimm stig fram til fjórða plássið, sum ber atgongumerki til UEFA Cup við sær. Komandi sunnudag skal FCK spæla á heimavølli móti meistaraliðnum úr Aalborg. Herfølge skal spæla á heimavølli móti Lyngby.

JH

Sogndal ikki nøgdir

Føroyska liðið í norskum fótbólti megnaði bara javnleik á heimavølli í fyrsta umfarinum

Sunnudagin varð fyrsta umfarið í næstbestu norsku deildini á skránni. Út frá einum føroyskum sjónarmiði er áhugin fyri hesi deildini sjálvsagt tengdur at, at tríggir føroyskir landsliðsspælarar eru partur av liðnum hjá Sogndal.

Føroyska liðið legði fyri á heimavølli móti L/F Hønefoss. Úrslitið var 1–1, eftir at Sogndal hevði verið á odda 1–0 í 1. hálvleiki.

Í síðstu viku luttóku Julian Johnsson og Kurt Mørkøre ikki í venjingini fyrrenn hóskvøldið, men alíkavæl vóru báðir á liðnum sunnudagin.

Vit søgdu í síðstu viku, at í fimtan venjingardystum hevði Kurt Mørkøre skorað tíggju mál. Tað er einki at undrast á, at teir í Sogndal hava stórt álit á føroyska landsliðsmanninum sum málskjútta.

Men í fyrstu royndini at leggja lunnar undir uppflytingina, sum teir í Sogndal so ógvuliga fegnir vilja hava til høldar í ár, eydnaðist tað ikki hjá Kurt Mørkøre at skora. Heilt sørur var hann kortini ikki, tí hann var við í uppspælinum til málið.

Longu í annað kvøld skal Sogndal aftur í eldin. Tá er annað umfarið í næstbestu norsku deildini á skránni. Sogndal skal spæla á útivølli móti Lyn. Hetta liðið taldist í fjør ímillum kappingarneytarnar hjá Sogndal í stríðnum um at vinna eitt pláss í bestu deildini.

Hans Fróði Hansen er triðji føroyski landsliðsmaðurin í Sogndal. Vit hava áður sagt, at hann var so óheppin fyri einum mánaði síðani at bróta óstbeinið fyri aðru ferð í ár og fyri triðju ferð í alt. Hans Fróði hevur verið í Føroyum, har teir hava sett brotið samanaftur. Men hann er ikki farin undir aftur venjingina í Sogndal, so tað er lítið sannlíkt, at hann verður nakað serligt við hesu megin summarsteðgin.

JH

Úrslit, danska superligan

30.04	AB-FC København	0-2
30.04	AGF-Esbjerg	4-3
30.04	Vejle-Lyngby	4-0
30.04	Viborg-OB	2-4
30.04	Brøndby-Herfølge	5-0
01-05	AaB-Silkeborg	
	(Leiktur eftir evstamark)	

Komandi dystir

03.05	FC København-AGF
07.05	Esbjerg-Brøndby
07.05	Herfølge-Lyngby
07.05	Silkeborg-Viborg
07.05	OB-AGF
07.05	AB-Vejle

Støðan, danska superligan

		dystir	v	-	j	-	vunnin t	mál	tapt mál	mál-munur	stig
1	Brøndby	27	13	-	7	-	7	50	30	20	46
2	Herfølge	27	13	-	5	-	9	39	41	-2	44
3	Viborg	27	12	-	6	-	9	41	40	1	42
4	AaB	26	10	-	11	-	5	46	28	18	41
5	Silkeborg	26	11	-	7	-	8	42	28	14	40
6	Lyngby	27	12	-	4	-	11	41	41	0	40
7	AB	27	10	-	8	-	9	37	32	5	38
8	FCK	27	11	-	4	-	12	38	31	7	37
9	OB	27	8	-	9	-	10	28	35	-7	33
10	AGF	27	8	-	7	-	12	30	41	-11	31
11	Vejle	27	6	-	10	-	11	34	53	-19	28
12	Esbjerg	27	6	-	4	-	17	29	55	-26	22

Føroysku kvinnurnar tóku øll á bóli

Kappróður: Um vikuskiftið hava føroyingar luttikið í heimsmeistaraskapnum í kappróðuri í gig á Scillyoyggjunum. Serstakliga úrslitið hjá kvinnunum tók øll á bóli, tá tær klóraðu seg frálíka væl í innleiðandi umførunum og samanlagt gjørdust nummar fimm í heiminum

Kvinnurnar á Jarnbardi tóku øll á bóli, tá tær megnaðu at vinna sær eitt fimtapláss í heimsmeistarakappingini fyri gig. Hetta er fyrsta ferðin, at føroysk kvinnumanning hevur royntt hetta slag av róðri

Mynd: Dagfinn Olsen

DAGFINN OLSEN AV SCILLY OYGGJUNUM

Um vikuskiftið hava føroyskar bátsmanningar luttikið í heimsmeistaraskapinum í kappróðri í gig á Scillyoyggjunum. Hetta er 3. ferðin, at føroyingar eru við og gjørdust úrslitini góð.

Tað eru vinnarar í 10 mannaførunum, ið umboða Føroyar. Í ár hava menninir á Eysturoyingi luttikið og kvinnurnar á Jarnbardi. Tað er fyrstað árið, at føroyskar kvinnur luttaka.

Føroysku kvinnurnar megnaðu at vinna seg inn á eitt samanlagt 5. pláss og kunnu sostatt rópa seg tær 5. bestu í heiminum.

Hjá monnum varð talan um eitt samanlagt 16. pláss og tað er eingin loyna, at heilt nøgdir eru menninir ikki við hetta.

Mergjaðar kvinnur

Serliga vóru tað kvinnurnar á Jarnbardi, ið hava staðið fyri teim góðu úrslitunum. Kappingin byrjar við, at allir bátarnir rógva. Í ár luttóku 68 bátar, ella fyri at nýta enska orðið, so er talan um eina gig, sum róð verður í.

Í hesum fyrsta umfarinum gekk væl hjá kvinnunum og tær løgdu sag aftanfyri heimsmeistararnar frá í fjør úr Hollandi. Lagnan vildi tó, at tá tær nærkaðust landi, stýrdu hesar báðar giggirnar innanskers. Tað vísti seg seinni, at hetta var ikki eftir reglunum og tískil endaðu kvinnurnar eftir koldøming í bólki B, hóast tær komu á mál sum nummar tvey.

Í næsta umfarinum komu tær á mál sum nummar 3 og komu sær upp í A-bólkin. Í 3. umfarinum komu tær á mál sum nummar 5 og í finaluni gjørdust tær eisini nummar 5.

Samanlagt endaðu føroysku kvinnurnar á einum 5. plássi og má hetta sigast at vera óført. Tað er einki at taka seg aftur í, at tað vóru føroysku kvinnurnar, ið fólk høvdu á munni á Scillyoyggjunum um vikuskiftið, eftir at tær í fagrasta veðri umboðaðu Føroyar í heimsmeistarakapingini í kappróðuri í gig fyri fyrstu ferð og stóðu fyri frálíkum úrsliti.

Ikki nøgdir

Manningin á Eysturoyingi mannaði føroysku giggina, Sowenna, í mannfólkaróðrinum. Tað gjørdu teir eisini í fjør, og fingu eitt samanlagt 8. pláss.

Í ár gekk ikki eins væl og tað varð eitt samanlagt 16. pláss til føroysku rógvararnar.

Í fyrsta umfarinum við øllum 68 luttakarunum gjørdust føroysku menninir nummar 16 og endaðu í B-bólkinum.

Í næsta umfarinum koma teir á mál sum nummar 3 og komu sostatt upp í A-bólkin.

Men í 3. umfarinum komu teir á mál sum nummar 11 og máttu niðuraftur í B-bólkin, tí bert 10 teir fyrstu halda seg í bólkinum.

Ludvík Justinusen, bátsformaður, dylir ikki, at manningin er ikki nøgd við úrslitið. Hann leggur tó dent á, at teir í 3. umfarinum róðu taktiskt. Teir hildu seg liggja sum nummar 9. Teir góðtóku heldur ikki dómin og nakað av stákan stóst av hesum, men eftir at hava sæð filmin, vendist ikki aftur og talan var um eitt 11. pláss.

Í finaluni í B-bólkinum kom føroyska manningin á mál sum nummar 4 og samanlagt gjørdist tað til eitt 16. pláss til manningina á Eysturoyingi í heimsmeistarakappingini í kappróðuri í gig á Scillyoyggjunum.

Føroyingar í gig

Føroyingar luttóku á fyrsta sinni í hesum slag av kappróðuri fyri trimum árum síðani. Tá mannaðu vestmenningar bátin. Í fjør vóru tað eins og í ár Eysturoyingar og so eru kvinnurnar eisini komnar við í ár.

Tað var Richard Hardman frá Amerada Hess, ið fekk hugskotið at fáa føroyingar við. Hann er síðani á ungum árum komin nógv út á Scillyoyggjarnar, og tá hann so sá kapróður á ólavsøku, fekk hann hugskotið og fór til verka. Føroyingar fingu síðani Brendan at venja í. Í dag er tað The Faroese Partnership, ið er høvuðsstuðul hjá føroysku rógvarunum.

Í byrjanini var ikki lætt hjá føroyingum, tí talan er um annan róður og annan bát, enn føroyingar eru vanir við. Fyrsta umfarið er ein teinur uppá 3200 metrar og hini eru 2200 metrar.

Báturin er ein sonevnd gig og ein situr ikki í somu síðu, sum árin er. Heldur ikki togar ein árina inn at búkinum, men hon skal líkasum framvið rógvaranum. Eisini takið í árini er øðrvísi.

Scillyoyggjarnar liggja við suðurendan á Onglandi - Landsend - og talan er um ítróttargrein, ið er komin í, tí menn av Scillyoyggjunum fyrr plagdu at kappast um at verða fyrstir út til tey stóru skipini, sum komu hesa leið. Menn av Scillyoyggjunum kundu vinna fitt av peningi við at verða losar hjá skipunum.

Hetta var helst eisini neyðugt, tí talan er um nógvar oyggjar og sker, so ikki er lætt at finna veg, er ein ikki staðkendur. Søgan sigur frá nógvum bjargingum og nógv eru vrakini runt um oyggjarnar.

Fólkið á vøkru oyggjunum livir einamest av ferðavinnu og talan er um reint og partvís órørt umhvørvi. Umleið 1700 fólk búgva á oyggjunum.

Men um vikuskiftið vóru tað føroysku kvinnurnar, sum fólk hevði á munni, eftir at tær eftir sína fyrstu luttøku, kunnu vera ernar av at eiga heiðurin sum tær 5 bestu í heiminum innan kappróður í gig.

Monnunum gekst ikki eins væl, og manningin á Eysturoyingi mátti taka til takkar við 16. plássinum

Myd: Dagfinn Olsen